# Heilsuverkið í Føroyum samstarv við øll Norðurlond

**Jógvan við Keldu ætlar at fáa Norðurlondini at bróta landamørkini niður á heilsluliga økinum fyri at fáa betri samstarv ímillum tey stóru londini og útjaðaran, eitt nú Føroyar og Grønland**

NORÐURLENDSKT SAMSTARV
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Heilsuverkini í øllum Norðurlondum skulu arbeiða nógv meiri saman.

Tað er ætlanin hjá Jógvani við Keldu, løgtingsmanni.

Hann hevur júst verið á Norðurlandaráðsfundi, har hann hevur umboðað Føroya Løgting og har reisti hann møguleikan fyri størri samstarvi ímillum heilsuverkini í teimum ymsu Norðurlonduum.

Hann heldur, at ikki minst hevði eitt slíkt samstarv fingið alstóran týdning fyri heilsuverkið í Føroyum og øðrum útjaðaraøkjum í Norðurlondum.

– Í útjaðaranum í Norðurlondum býr lítið fólk og sostatt er tað trupult at kunna veita borgarunum nóg góða tænastu á ymsum økjum, sigur Jógvan við Keldu.

Hann vísir til eitt álit, sum Norðurlandaráðið hevur gjørt um útnorður og hann gjørdi ráðnum greitt, at hann kundi hugsað sær at lagt stóran dent á tann partin av álitinum, sum umrøður samstarv ímillum heilsuverkini.

– Tað hevði fingið alstóran týdning fyri útjaðaran, segði Jógvan við Keldu við Norðurlandaráðið.

Løgtingsmaðurin sigur, at Norðurlond seta heilsupolitikk og vælferð í hásætið og hann fegnaðist um teir møguleikar og teir fyrimunir, sum útjaðaraøkini høvdu av, at viðgerð við telemedisini varð so nógv ment.

Tí mælti hann til, at hesin parturin av norðurlendska samstarvinum verður tikin upp til serliga viðgerð fyri at menna samstarvið ímillum heilsuverkini í útjaðaraøkjunum og teimum framkomnu, stóru Norðurlondini.



*– Fáa vit størri samstarv ímillum heilsuverkini í Norðurlondunum, hevði tað verið føroyingum til stórt gagn, eins og hinum útjaðarunum í Norðurlondum, sigur Jógvan við Keldu, sum umboðar Løgtingið í Norðurlandaráðnum*

### Landamørk brótast niður

Jógvan við Keldu sigur, at hóast telemedisin er eitt stórt framstig, skal týdningurin av beinleiðis sambandi ímillum sjúkling og læknar ella onnur starvsfólk í heilsuverkinum, als ikki undirmetast.

Tí heldur hann, at tað hevur týdning at bróta landamørkini ímillum norðurlond niður á hesum øki og at gera øll Norðurlond til ein stóran, innmarknað á heilsuliga økinum.

Hann sigur, at hetta at bróa mørk niður, er rákið allastaðni.

– Hetta at taka marknaðforðingar eru frammi á hvørjum einasta fundi í Norðurlandaráðnnum, bæði tá ið vit tosa um mentan, umhvørvi, vinnulív og annað.

Og hann heldur, at hetta eisini eigur at víðkast til til heilsuliga økið, so at mørkini eisini verða niðurbrotin har.

Hann hugsar bæði um samstarv á sjúkrahúsøkinum og um samstarv á kommunulæknaøkinum.

Tað, hann hugsar um, er bæði at fáa læknar út í útjaðaran og samstarv ímillum sjúkrahúsini um viðgerðir.

– Tað er ongin loyna, at útjaðaraøkini hava stórar trupulleikar at fáa læknar, eins og tað ikki er sjálvsagt, at tað ber til hjá londunum í útjaðaranum at bjóða borgarum sínum góðar viðgerðir, sum eru á hædd við tey stóru norðurlondini.

Tí vónar hann, at tað hevði verið ein stórur fyrimunur at bróta mørk niður á heilsuliga økinum, tí tað hevur so stóran týdning sum nakað annað.

Ein stórur trupulleiki er trotið á læknum

– Læknatrotið ger, at tað er trupult at fáa ein stóran samanhang í heilsuverkið, tí læknar skifta so ofta.

Løgtingsmaðurin sigur, at tað kann vera, at eitt slíkt samstarv eisini kann miðja ímóti at fáa fleiri fólk at lesa til lækna.

Jógvan við Keldu sigur, at tað hann nú fer at royna, er at fáa Norðurlandaráðið at taka málið upp í nevndararbeiðið.

– Fyrsta liðið í hesum skal vera at gera støðuna upp í teimum ymsu økjunum í Norðurlondum. Tá ið tað er gjørt, eiga vit, í samráð við læknafgeløg og onnur felag í heilsuliga økinum, at kanna eftir, hvussu samstarvið kann byggjast út.

# Hr./fru præsident

Som talsmand for Miljø-og Naturressourceudvalget kan jeg indledningsvis sige, at vi i udvalget fuldt ud kan tilsslutte os redegørelsen og anbefalingerne, som en arbejdsgruppe, nedsat af Ministerrådet er kommet med i betänkningen »Vest-Norden i det nordiske samarbejde.«



Nu har man i efterhånden mange år på den nordiske dagsorden fokuseret meget på nærområderne for i hvertfald en del af de nordiske lande. Jeg tänker her specielt på nörområderne Baltikum og Nordvest Rusland. Nu mere aktuel end nogensinde, da de baltiske lande bliver fuldt gyldige medlemmer af NIB. Denne dagsorden har givet det nordiske arbejde et meningsfuldt indhold. Forhåbentligt kommer der mere balance i nordisk närområdepolitik, nu hvor vi også inddrager Vest-Nordens nærområder i vores arbejde. Närområderne som Canadas Atlanterhavskyst, Skotland, de skotske öer, Irland og Nordirland.

Små befolkninger, store afstande, koldt klima og dominerende afhængighed af havet og dets ressourcer. Det er fællesnævneren for Færøerne, Island og Grønland og disse landes nærområder. Men specielt er det afhængigheden af havet og dets ressourcer, der har den altafgörende betydning. Havet skiller os, havet binder os sammen, og havet er en del af vores identitet.

Politik er alt for själden handlingens fag. Meget ofte bliver det ved retorikken, mens resultaterne udebliver. Derfor er det godt, at denne betänkning også indeholder konkrete indsatsområder og anbefalinger og deriblandt specielt angående havmiljö og havressourcer, som vi i udvalget er mest interesseret i.

Nordisk Råd og Ministerråd har i denne forbindelse en vigtig opgave. Vores lande og vores närområder forvalter jo en meget stor og betydelig del af Atlanterhavet. Et hav, der ikke kun har betydning for vores egen overlevelse og udvikling, men i lige så höj grad har betydning for de lande, der konsumerer den fisk og de fiskeprodukter, vi eksporterer. Det forpliger os til et ansvarsfuldt arbejde ikke kun her og nu, men også med en langsiget strategi, der vil give vores efterfölgere mindst lige så gunstige muligheder, som vi har.

Derfor er det også nödvendigt med målrettet og relevant forskning, her specielt havmiljö og klima. En forskning, der afklarer – en forskning, der peger fremad.

Vi er forpligtet til at tage ansvar for vores havmiljö – vi er forpligtet til en bäredygtig udnyttlese af havressourcerne, både levende og ikke levende. Det gälder også en fälles nordisk forståelse for en harmonisk bäredygtig udnyttlese af havets ressourcer.

Der bliver sagt i betänkningen, at havets muligheder og problemer kalder på gränseoverskridende, tvärsektorielt samarbejde for at sikre en bäredygtig udvikling. Derfor er det ikke alene vigtigt, men sandelig også nödvendig at inddrage närområderne i dette arbejde, for elleres giver det gränseoverskridende arbejde jo ingen mening.

Vi i Miljö- og Naturressourceudvalget vil med interesse fölge den videre udvikling.

Betänkningen indeholder desuden en räkke fornuftige anbefalinger på f. ex. uddannelse-, sundhed-, transport- og turismeområdet, som jeg dog ikke skal kommentere.

Der er sket en fornuftig udvikling af det nordiske arbejde under det svenske formandsskab, og jeg har store forventninger til det islandske formandsskab. Statsministeren David Oddson´s programerkläring for det islandske formandsskab åbner rigeligt op for en vestnordisk orienteret satsning, som også Miljö- og Naturresourceudvalget kan se frem til.

Tak hr/fru präsident.



# Avsporað orðaskifti

*Redaktørar hava størri vald enn nakar tingformaður. Men teir misskilja sína ábyrgd, heldur Eyðun Andreasen*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



**Kjakmentanin í Føroyum hevur tað ikki gott, heldur Eyðun Andreasen fólkalívsfrøðingur. Síðsta dømi, tá ein landsstýrismaður var samanborin við Hitler, er eitt tekin um andaliga armóð hjá teimum, sum føra orðið. Blaðstjórar svíkja eisini, heldur hann, tí teir loyva øllum framat í bløðunum og tora ikki at sensurera ógrundaðar ákærur**

KJAKMENTAN
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Andalig armóð!

Við tveimum orðum lýsir Eyðun Andreasen, fólkalívsfrøðingur við Fróðskaparsetur Føroya, sína hugsan um málburðin herfyri í løgtinginum. Vit hava biðið hann sagt sína hugsa um føroyska kjakmentan, nú bløðini skriva um óhepnar samanberingar.

Seinasta dømið, tá løgtingskvinnan Katrin Dahl Jakobsen samanbar landsstýrismannin Høgna Hoydal við Hitler, heldur hann vera tað grovasta, hann hevur hoyrt á tingi. Okkurt líknandi hevur áður verið í bløðunum, men úr løgtinginum heldur hann seg ikki hava hoyrt nakað, ið kann samanberast.

– Hetta er eitt tekin um desperatión, frustratión og eitt vantandi álit á egna argumentatiónsmegi. Hon meinar tað neyvan í fullum álvara, at Høgni Hoydal er ein paralellur við Hitler. Tað vísir, at tú skalt vera sera varin, tá tú gert samanberingar. Brúkar tú myndir, so skal tað gerast ordiligt. Annars vendir myndin aftur til tín og rakar teg sjálvan, tí nú kunnu fólk ákæra hana fyri propagandametodur, sigur Eyðun Andreasen.

Slík próvførsla í tinginum er skaðilig fyri fólkaræðið í nógvar mátar, heldur fólkalívsfrøðingurin. Tað dregur uppmerksemi burtur frá tí evninum, ið kjakast verður um. Tað tokuleggur heldur enn forklárar tað, sum skal koma fram.

– Hetta førir burtur frá tí idéala orðaskiftinum, sum byggir á fríar, intelligentar samrøður, sum menna spurningar, ið vit kunnu taka støðu til. Sjálvandi skal tað ikki vera keðiligt at lurta eftir løgtinginum, og tí eiga vit eisini at tola eitt sindur av, men tað skal valdast, sigur Eyðun Andreasen.

### Leys av søguni

Síðstu árini hava verið fleiri dømi um, at politikarar eru farnir út um mark. At kalla ein landsgrannskoðara fyri ein gemenan bókhaldara er bara vanligt fornermilsi. At kalla løgmann ein danskan leigusvein er verri. Kallar tú fólk quislingar ella landasvíkjarar fert tú uppaftur longri. Men tá tú fert til at samambera við heimsins bølmenni, so er farið langt út um mark, heldur Eyðun Andreasen.

Spurningurin er, hví tað hendir í Føroyum, tí tað er púra óhugsandi aðrastaðni, at slíkt kemur fyri, uttan at tað verður átalað í stundini og stór gøla spyrst burturúr.

– Tað er óhugsandi, at hetta hevði hent í Svøríki, Týsklandi ella Danmark. Kanska er tað tí, at vit ikki hava verið í sambandi við hasa søguna, sum enn setir djúp sár í Evropa, og ikki hava kent hana á egnum kroppi. Kanska er tað eisini vantandi vitan. Men helst er tað ein desperatión yvir, at tín argumentatión ikki ber frukt, og tí tekur tú til harðari orð, sigur Eyðun Andreasen.

### Einki nýtt

Hetta er kortini einki nýtt í Føroyum, leggur Eyðun Andreasen dent á. Hann nevnir eitt dømi um, at Petur Mohr Dam einaferð segði Rikard Long vera nasist. Tað málið endaði í rættinum. Janus Djurhuus førdi sakina fyri Rikard, sum vann málið.

Eyðun Andreasen heldur, at tað er sjálvstýrismálið, sum vekir so sterkar kenslur í fólkinum at tey taka so rívan til.

– Tað er ein gomul traditión í Føroyum at samanbera sjálvstýrisfólk við nasistar. Vit síggja ein mann, sum er í bløðunum í somu ørindum í hesum døgum. Tað verður brúkt í argumentatióníni, at markið millum vanligar tjóðskaparkenslur og ekstrema nationalimsu er flótandi. Sjálvstýrismálið elvir til sterkar kenslur, og stríðið hevur staðið á, síðan vit fingu floksbýti. Tað hevur verið ein mótsetningur í fólkinum í eina heilda øld, og tað verður ikki loyst, fyrr enn vit finna eina semju ella taka loysing, sigur Eyðun Andreasen.

Tann breiða semjan hevur verið eitt afturvendandi gandaorð hesi árini. Men trupulleikin er, at viljin at finna semjuna er sjálvdestruktivur. Tey somu fólkini, sum siga seg vilja semjuna, forða fyri henni.

– Samanbert tú ein mann við Hitler, so sigur tú samstundis, at tú ikki vilt samstarva við hann. Tí eingin vil samstarva við Hitler, og tí er hetta eitt tekin um, at vit neyvan fáa nakra semju, tí hesi fólk makta ikki at finna semjuna, sigur Eyðun Andreasen.

### Bløðini verri

Eitt er orðaskiftið á løgtingi. Eitt annað er orðaskiftið í bløðunum, sum fólkalívsfrøðingurin heldur er á einum uppaftur lægri støði.

– Bløðini eru ofta grovari, og eg haldi at redaktørarnir skuldu tikið ábyrgd. Tað gera teir ikki, og onkuntíð ganga teir enntá á odda. Nógv av tí, sum sleppur framat í føroyskum bløðum, hevði ikki sloppið framat aðrastaðni. Her sleppa fólk at leggja fram ákærur uttan at føra prógv fyri sínum pástandum, og alt kemur við, sigur Eyðun Andreasen.

Tað er ein styrki við føroyska demokratinum, at tað er lætt at sleppa til orðanna. Hinvegin er tað at gera fólkaræðinum eina bjarnatænastu at loyva øllum ígjøgnum sensurin. Tað førir kanska til, at summi halda seg aftur, tí tey kunnu enda í sama leypi ella vera álopin fyri síni sjónarmið.

– Redaktørar hava størri vald enn nakar tingformaður. Men teir misskilja sína ábyrgd, haldi eg. Teir halda seg avmarka tað fría orðaskiftið, um teir forða ávísum sjónarmiðum at sleppa framat. Teir eru bangnir fyri at vera ákærdir fyri sensur, men tað eiga teir at tola, tí teir hava so stórt vald, sigur Eyðun Andreasen.

## Uppsagnir á Norrönu í stríð við avtalu

**Tað er brot á avtaluna millum Smyril Line og Fiskimannafelagið, at føroyingar eru uppsagdir, samstundis sum útlendingar framvegis eru umborð. Felagið hevur kært uppsagnirnar og bíðar eftir svari, áðrenn tiltøk verða umhugsað**

HÓPUPPSØGN
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Fiskimannafelagið góðtekur ikki háttin, fólk eru søgd upp á Norrönu. Tað ger Óli Jacobsen, formaður, púra greitt.

– Tá ið vit samráddust um manning á Norrönu, høvdu vit sum fortreyt, at polakkar og aðrir útlendingar ikki troðkaðu føroyingar í land. Tað er júst tað, sum nú hendir. Útlendingar eru framvegis umborð, og tað er brot á okkara fortreytir, sigur Óli Jacobsen, formaður í Fiskimannafelagnum.

Felagið vil heldur ikki góðtaka, at fólk, sum hava verið umborð í nakrar mánaðir, troðka fólk av, sum hava verið við í fleiri ár.

30 fólk umborð á Norrönu, sum starvaðust á hotelldeildini, eru søgd úr starvi. Átta teirra búgva í Føroyum, átta eru úr øðrum norðurlendskum londum, og 14 polakkar eru uppsagdir.

Orsøkin til uppsagnirnar er, at virksemi hjá hjá Norrönu, nú lágárstíð er, svarar ikki til vónirnar, sum vóru. Norröna heldur kortini ferðaætlanina, sum varð løgd fyri veturin.

Sjómannadeildin hjá Fiskimannafelagnum hevur sent Smyril Line eitt skriv, har boðað verður frá, at uppsagnirnar ikki verða góðtiknar. Spurdur, um Fiskimannafelagið setir tiltøk í verk, um uppsagnirnar ikki verða tiknar aftur, svarar Óli Jacobsen, at eitt stig verður tikið í senn. Fyrst verður bíðað eftir svari frá Smyril Line.